

**Um Kall**
Kall er fjarskiftisfyritøka, sum bjóðar GSM og fastnet. Kall eigur dóttirfelagið EITT, sum bjóðar breiðband kring alt landið. Kall seldi fyri áleið 80 milliónir í 2006 og hevði 6,4 mió.kr. í avlopi. Á Kalli starvast 26 fólk. Kall er umvegis samtakið TEYMI skrásett á OMX (Norðurlendska partabrævamarknaðinum).

## Roknskaparfólk

Kall søkir fólk við roknskaparroyndum at gerast partur av Kalli

**Arbeiðsuppgávur**
- Bókingar
- Kunda- og veitarastýring
- Avstemman
- Uppsetan av mánaðar- og ársroknskapum
- Aðrar roknskaparligar uppgávur

Við øðrum orðum fært tú eitt sjálvstøðugt ábyrgdarøkið, við nógvum og spennandi uppgávum í einari fyritøku, sum er partur av skrásettum samtaki á partabrævamarknaðinum (OMX).

**Vit vænta at**
- tú hevur viðkomandi útbúgving
- tú hevur arbeitt við bókhaldi í nøkur ár
- tú er vandur brúkari av Excel, Word og bókhaldsskipanum
- tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- tú er nærlagdur
- tú er liðspælari
- tú er røkin
- tú hevur hugin at læra
- tú er tolgóður til skjalfesting

**Vit bjóða**
Spennandi, mennandi og til tíðir krevjandi arbeiðsumstøður, har høvið sjálvsagt er fyri framhaldandi, persónligari eins væl og fakligari menning í einum livandi og dynamiskum umhvørvi. Til starvið eru bæði møguleikar fyri flekstíð og heimaarbeiðsplássi. Tú mást rokna við at arbeiða av og á í vikuskiftum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber, og lønin verður avtalað í samsvari við royndir og førleika.

## Kundarøktari

Í sambandi við økt virksemi søkja vit eftir dugnaligum og framfýsnum starvsfólki til kundarøktina.

**Arbeiðsuppgávur**
- at svara fyrispurningum frá viðskiftafólki umvegis telefon ella teldupost
- annars vanligar fyrifallandi uppgávur á skrivstovuni

**Vit vænta, at**
- tú ert rímiliga kring/ur í teldu og dugir at nýta mest vanligu forritini
- tú hevur góð samstarvsevni og dugir at samskifta bæði við lærd og leikfólk í talu og á skrift
- tú dugir at gera tað torføra einfalt
- tú ert liðspælari
- tú ert ábyrgdarfull/ur og tænastutilvitað/ur
- tú leggur dent á at lata uppgávur til ásettu tíð og við tí góðsku, sum viðskiftafólk okkara vænta
- tú ert røkin

**Vit bjóða**
Spennandi, mennandi og til tíðir krevjandi arbeiðsumstøður, har høvið sjálvsagt er fyri framhaldandi, persónligari eins væl og fakligari menning í einum livandi og dynamiskum umhvørvi.

**Setanarviðurs kifti**
Starvið verður sett skjótast til ber, og lønin verður avtalað í samsvari við royndir og førleika. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

**Fyrispurningar**
Hevur tú spurningar til starvið, er tú vælkomin at ringja til Malan Johansen á 50 20 56 ella senda ein teldupost til malan@kall.fo

**Umsóknir**
Møguligar umsóknir saman við prógvum v.m. (CV) til omanfyri nevnda starv, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. mai. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Send umsóknina til:

Kall
Postboks 3299
Óðinshædd 2
FO-110 Tórshavn
Viðm. Brævbjálvan "roknskaparfólk"

Ella teldupost til malan@kall.fo

kall
20 20 20